**Til foreldur at næmingum í 4 .- 10.flokki**

Sum liður í einari størri kanning um frítíðarvanar í Føroyum, verður barn/børn tygara í tíðarskeiðinum **19. mars til 30. apríl 2021** boðin at luttaka í einari spurnarkanning, ið snýr seg um frítíðarvanar hjá børnum og ungum. Kanningin verður gjørd millum næmingar í 4.-10. flokki í øllum skúlum kring landið. Kanningin er talgild. Næmingarnir svara umvegis alnótina í einum undirvísingartíma, har lærarin fer at greiða frá spurnarblaðnum og hjálpa næmingunum, um tørvur er á tí.

Umframt fólkaskúlakanningina verður samstundis gjørd ein umboðandi fólkakanning millum vaksnar føroyingar frá 17 ár. Í hesum sambandi gera vit vart við, at næmingar í aldrinum 17 ár kunnu verða bodnir at luttaka í kanningini tvær ferðir. Um næmingurin hevur svarað spurnablaðnum heimanifrá, skulu tey ikki svara spurnablaðnum í skúlanum.

**Hvør fyrisitur kanningina?**
Tað er Idrættens Analyseinstitut, sum skipar fyri kanningini, sum er eitt samstarv millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, fleiri føroyskar kommunur, Uttanríkis- og Mentamálaráðið, Fólkaheilsuráðið, Fróðskaparsetur Føroya, Ítróttarsamband Føroya (ÍSF), Føroya Ungdómsráð (FUR) og Lokale og Anlægsfonden (LOA). Kanningin hevur sum endamál at útvega vitan og skjalfesting um frítíðarvanar hjá børnum og ungum, ið kann brúkast sum grundarlag fyri framtíðar menning av frítíðarlívinum í Føroyum. Til ber at lesa meira um kanningina á www.idan.dk.

Svarini eru dulnevnd, og tað verður tískil ikki møguligt at eyðmerkja næmingin út frá svari hansara. Dáta verður strikað, tá kanningin er liðug. Næmingarnir verða ikki kontaktaðir í sambandi við kanningina.

Tygum finna persóndátapolitikkin hjá Idrættens Analsyeinstitut á www.idan.dk.

Tað er sjálvboðið at luttaka í kanningina, men vit vóna, at barn/børn tygara vilja luttaka í kanningini, tí tað fer at stuðla undir øktari vitan um frítíðarvanar hjá børnum og ungum.

**Kontaktpersónur**
Um tygum hava spurningar, eru tygum vælkomin at seta tygum í samband við Mette Eske frá Idrættens Analyseinstitut á mette.eske@idan.dk ella á tlf. +45 2478 2908..

**Vinaliga**
Idrættens Analyseinsitutet